gult4 cyan4 magenta4 svart4



# Eingin treður dansin undir moldum

**Stóra landsdansistevnan var hildin í Havn leygardagin. Umleið 600 fólk hugnaðu sær og dansaðu til ljósan morgun**

DANSUR

*Orð: Edvard Joensen*
*Myndir: Jens Kr. Vang*



At dansur og spæl eru gleðibrøgd kom týðiliga til sjondar, tá eini 600 fólk hittust til landsdansistevnu í Havn leygardagin. Stuttleiki hugni og vinalag eyðkennir slíkar stevnur, og hendan var einki undantak.

Stevnan varð sett á Vaglinum klokkan trý seinnapartin leygardagin. Tað vóru tey trý dansifeløgini í høvuðsstaðnum, Tøkum Lætt, Dansifelag Kaggans og Dansifelagið í Havn, sum skipaðu fyri stevnuni. Vegna fyrireikararnar beyð Herluf Gaard Joensen vælkomin og greiddi frá stevnuni.

Almennu setanini stóð Heðin Mortensen, formaður í Mentanarnevnd Tórshavnar Býráðs fyri. Eisini helt Regin Eikhólm, sum er virkin dansari, røðu um føroyskan dans, eins og felagssangir vórðu sungnir. Vitiligt slíkir, sum ganga til vísuløg og eru kendir og lættir at syngja.

Eftir sjálva setanina, sum var einasta almenna tiltakið á stevnuni, varð tikið saman á Vaglinum, har einar tvær stuttar vísur vórðu tiknar.

Tá tiltakið á Vaglinum var av, varð farið niðan í Býráðssalin, har framløga var av nýggjari bók um føroyska dans, sum Árni Dahl hevur lagt til rættis eftir áheitan frá landsnfelag dansifelagana, Sláið Ring. Umrøða av hesum tiltakinum er aðrastaðni í blaðnum.

Eftir setanina samlaðust tilmeldaðu luttakaranir til stórt borðhald í ítróttarhøllini á Hálsi. Har vórðu, sum vera man, nógvar røður hildnar, eins og dúgliga varð sungið. Hóast ein ítróttarhøll er sera illa egnað til felagssang, gekk tað so rímiliga kortini.

Landsdansistevnan verður hildin triðjahvørt ár, og boðið varð eisini til næstu landsdansistevnuna undir borðhaldinum í ítróttarhøllini. Formaðurin í Vága Dansifelag beyð øllum dansifeløgunum í Føroyum til landsdansistevnu í Vágum 2004.

– Gjøgnum nýggja undirsjóvartunnilin, sum tikið varð til.

Eftir borðhaldið varð farið oman í Sjónleikarhúsið, har seinasti partur av skránni fyri landsdansistevnuna 2001 varð hildin. Sjálv dansiskráin, har feløgini hvør møtti við sínari vísu ella kvæði. Soleiðis at fólk úr felagnum skipaði, meðan allir luttakararnir so kundu dansa við.

Ymiskt er, sum valt verður, tá farið verður soleiðis. Onkur velur at hava kvæði, sum vilja nakað. Eru long og mergjað, og kanska ikki øll duga. Tað er so góðum líkt. Meðan onnur koma við styttri og rættiliga væl kendum vísum, har nógv fleiri fólk koma uppí. Og hendan samansetingin riggaði eisini rættiliga væl til slíka skrá. Fólk gingu upp og niður úr dansinum, sum teimum nú líktist best.

Einaferð út móti morgni var skráin liðug, og so varð, sum vanligt er, kappast um at byrja.

Vanligt plagar at vera, tá so mikið er útliði, at mest lættar vísur verða tiknar.

Men ikki øll eru, sum skilja umstøðurnar – hava situatiónsfornemilsi. So móti morgni at byrja kvæði, sum er góð 100 ørindi til longdar og ikki so alkent, at flestu fólk duga uppií, ger bara tað, at fólk rýma av gólvinum, og kanska onkur beinleiðs fer til hús.

Fólk vóru sera samd um, at hetta var einasta, sum lýtti stevnuna eitt lítið sindur. Tí slíkt er stuttligt fyri teir 13 ella 27, sum duga slíkt kvæði, meðan øll hini umleið 600 fólkini bara keða seg.

Og sera sjónligt gjørdist tað, tá sumbingar so beint aftan á mannaðu seg til eina lætta vísu, sum bókstaviliga fylti gólvið aftur. Dansigleðin lýsti av fólki, og at at kalla hvør einasta sál, sum eftir var, fór uppí. Líka mikið um tey dugdu orðini ella ikki.

Onkur tók til, at tað var á leið sama kensla sum at vera í góðum harmonikudansi. Tú beinleiðis sveimaði eftir gólvinum.





gult5 cyan5 magenta5 svart5



# Enn ongar vørur til Suðuroy og Sandoy

**Um vikuskiftið varð undantaksloyvi givið til at flyta vørur til Suðuroynna og Sandoynna, men hesin flutningur varð kortini av ongum, tí nú løgdu arbeiðsgevararnir seg í vegin**

VERKFALL

*Áki Bertholdsen*



*Suðuroyingar og sandoyingar fáa ongar vørur, tí nú leggja arbeiðsgevarar seg í buktina. Antin er fríur flutningur, ella er ongin flutningur, siga arbeiðsgevararnir. Í Kollafirði vórðu vegirnir avbyrgdir mánanáttina*

Nógvastaðni kring landið eru nógvar vørur faranar at ganga undan, nú verkfallið er farið at draga út.

Eitt nú verður sagt,at neyðsynjarvørur, eitt nú epli, egg, mjøl, melis, wc pappír, og aðrar vørur, av álvara eru uppi nógva staðni, eitt nú í Suðuroy og í Sandoynni.

Men eftir at politiið gjørdi av at rudda vegbyrgingarnar í Kollafirði, í Leirvík og aðrastaðni við, hevur stór ónøgd verið um, at teir partarnir í landinum, har tað er koyrandi, onki merkja til verkfallið, men at aðrir partar ongar vørur skulu fáa.

Hetta førdi um vikuskiftið til, at Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag gjørdu av at geva einari heilsølu undantaksloyvi til at flyta vørur til handlar í Sandoynni og í Suðuroynni, sum annars ikki hava fingið vørur, síðani verkfallið byrjaði.

## Arbeiðsgevarar blokera

Tað var Heilsølan hjá Poul Hansen sum fekk undantaksloyvi til at føra nakrar úrvaldar neyðsynjarvørur til handlar í Sandoynni og í Suðuroynni nú um vikuskiftið.

Harry Benjaminsen, nevndarlimur í Føroya Arbeiðarafelag, sigur, at orsøkin til, at ein heilsøla varð vald burturúr, er, at Føroya Arbeiðarafelag vil ikki missa tamarhaldið á støðuni, og verða fleiri heilsølur valdar, er tað so skjótt, at ongin veit, hvørjar vørur verður flutt og til hvønn.

– Vit eru ikki úti eftir at raka vanliga fólkið og vit gera heldur ikki mismun á fólki. Tá ið summir føroyingar fáa vøru, er tað ikki rætt at aðrir ikki skulu kunna fáa tað, sigur Harry Benjaminsen.

Men vørurflutningurin um vikuskiftið varð av ongum kortini, tí nú hava arbeiðsgevararnir lagt seg í buktina og hava forðað fyri, at vøran verður flutt.

– Fleiri heilsølur hava tosað við Arbeiðsgevarafelagið um hetta mál og semja er ímillum heilsølurnar og arbeiðsgevarafelagið um, at arbeiðshátturin hjá fakfeløgunum í hesum máli, kann ikki góðtakast, sigur Jan Mortensen á Vinnuhúsinum.

Tað, sum arbeiðsgevararnir sipa til, er at undantaksloyvi bara er givið einari heilsølu til at føra ávísar vørur til ávísar handlar í Sandoynni og í Suðuroynni.

– Støða okkara er, at antin er fríur vøruflutningur ávísan túr ella ávísan dag til handlar sum mangla vørur, ella eigur eingin at senda vørur, sigur Jan Mortensen.

Føroya Arbeiðsgevarafelag sigur, at tað er týdningarmikið, at støðan er eins fyri allar vinnurekandi og at Føroya Arbeiðarafelag hevur ongan rætt til at stýra vøruflutninginum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur tí í skrivi til Føroya Arbeiðarafelag gjørt greitt, at um vøra skal flytast, eigur Føroya Arbeiðarafelag tí í fjølmiðlunum at lýsa, at ávísan túr ella ávísan dag er frítt at flyta vørur til handlarnar, sigur Jan Mortensen.

Blokera aftur nú:

# Vit hava fullan rætt at verja okkum

VERKFALL

*Áki Bertholdsen*



*– Vit hava fullan rætt til at forða fyri at verkfalsbrótarar úr Havn floyma inn yvir okkum vioð vørum og farmi, sigur Ingeborg Vinther. Tí eru vegirnir í Kollafirði aftur avbyrgdur. Blokadur eru eisini settar upp aðrastaðni í landinum*

– Vit hava fullan rætt til at verja okkum fyri verkfalsbrótarum úr Havn. Tí hava vit aftur sett blokadur upp ymsastaðni í landinum.

Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag sigur, at tað er ongin slingur í valsinum hjá feløgunum, sum eru í verkfalli.

Bæði hósdagin og fríggjadagin høvdu feløgini fundir í Kollafirði um støðuna.

Ingeborg Vinther sigur, at teir fundirnir vóru »knasandi góðir«.

Tað vóru eini 750 fólk á fundi. Lagið er gott og øll eru samd um, at her skal ikki slakast og tey góvu okkum fulla undirtøku, sigur hon.

Á tí fundinum varð eisini gjørt av at herða verkfallið. Tískil vórðu blokadur aftur skipaðar mánanáttina, bæði í Kollafirði og aðrastaðni í landinum við.

– Løgreglan heldur eyguni við okkum, so vit siga ikki, hvar blokadurnar eru, men talan er bæði um vegir, havnir, alistøðir og onnur virki, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at í gjáramorgunin vóru um 200 fólk í Kollafirði.

Men hesuferð verða persónbilar hjá vanligum fólki ikki kannaðir.

– Vit eru ikki úti eftir privatfólki. Tað er arbeiðsgevaran, vit vilja raka, sigur Harry Benjaminsen, nevndarlimur í Føroya Arbeiðarafelag, sum eisini viðgongur, at tað var nakað nógv av tí góða av kanna hvørt viðførisrúm.

Politiið fylgir við gongdini, men á miðdegi í gjár høvdu teir onki gjørt.

Føroya Arbeiðarafelag hevur fingið at vita, at tað er ólógligt at byrgja vegirnar av, so at ferðslan ikki sleppur at ganga ótarnað.

Men tað taka tey sær ikki tykni av.

– Vit hava fullan rætt til at verja okkara øki, so at verkfalsbrótarar úr Havn ikki floyma inn yvir okkum við vørum og farmi. Tað er okkara fremsta skylda, so tað fara vit at gera, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at møguliga verða onnur tiltøk sett í verk sumfrálíður.

Annars verða framvegis ongi undantaksloyvi gjørd, uttan til neyðsynjarvørur og fyri at javntstillað øll.

– Arbeiðsgevararnir fingu at vita, at kroystu teir okkum út í verkfall, blivu ongi undantaksloyvi givin, hvørki til alivinnuna, ella til aðra vinnu, og tað halda vit fast um, sigur Ingeborg Vinther.

Arbeiðsgeverafelagið:

# Verkfallið verður drúgt

**– Eg vænti, at hetta verður eitt drúgt verkfall. Men tað er nógv, sum bendir á, at verkfallið byggir á eina misskijling. Tí hava vit skotið upp, at hvør parturin velur ein serfrøðing at gera nakrar útrokningar**

VERKFALL

*Áki Bertholdsen*

– Støðan er rættiliga fastlæst, so vit skulu rokna við, at verkfallið verður drúgt.

Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum, sum umboðar Arbeiðsgevarafelagið, heldur, at fólk skulu gera seg út uppá, at verkfallið hjá Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag, verður drúgt.

– Partarnir standa rættiliga langt frá hvørjum øðrum og tí stúri eg fyri, at verkfallið verður drúgt, sigur Jan Mortensen.

Men tað ringasta av øllum er, at arbeiðsgevararnir halda, at tað er ein misskiljing, sum hevur ført til, at feløgini eru farin í verkfall.

– Ein høvuðsatfinning frá arbeiðarafeløgunum er, at góðtóku tey semingsuppskotið, høvdu tey fingið 2,5% minni í lønarhækking, enn limirnir í Havnar Arbeiðsmannafelag og arbeiðarafeløgunum í Klaksvík, hava fingið.

Tað, sum tey sipa til, eru ymsar viðbøtur, sum Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag fingu í samráðingunum í 1999, men sum feløgini í Klaksvík og Havnar Arbeiðsmannafelag ikki fingu.

Talan er um tvær krónur eyka um tíman fyri at koyra oljubil, umframt 75 oyru eyka um tíman fyri kvøldarbeiði í sambandi við skiftivaktir.

Hesar viðbøturnar vóru ikki í semingsuppskotinum, sum varð lagt fyri Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Føroya Arbeiðarafelag sigur, at hetta svarar til eina lønarhækking uppá 2,5%, sum ætlanin sostatt var at tey skuldu fáa minni í lønarhækking hesuferð, enn Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgini í Klaksvík hava fingið.

Jan Mortensen vísir hesum aftur púra avgjørdur.

– Talan er ikki um 2,5%, men um 0,13%, sigur hann. Hann sigur, at teir, sum koyra oljubil eru 22 í tali. Og tað er skjótt at rokna út, at 75 oyru eru bara góð 0,8% av tímalønini upp á 83,72 krónur.

– Tað vil siga, at arbeiða øll arbeiðsfólk í skiftivakt við fullari ársinntøku, svarar hesar eykaviðbøturnar, sum Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag, fáa, til 0,13% av lønini.

Men royndirnar vísa, at tað eru bara eini fimm fiskavirki, sum brúka skiftivaktir av og á, so í veruleikanum ar talan enntá um nógv minni enn 0,13%, sigur Jan Mortensen.

Hvussu arbeiðarafeløgini koma til 2,5%, hevur hann onga sum helst peiling av.

## Serfrøðingar

Hann sigur, at tískil er vaerkfallið framvegis heilt óskiljandi.

Men arbeiðsgevararnir halda, at tað hevur stóran týdning at allar misskiljingar verða ruddaðar av vegnum og at partarnir eru samdir um útrokningargrundarlagið.

Tí skutu arbeiðsgevararnir í gjár upp fyri Feløgunum í verkfalli, at tey valdu hvønn sín óhefta serfrøðing at gera hesar útrokningar fyri feløgini

– Tað er eingin meining í at partarnir eru ósamdir um útrokningargrundalagið, sigur Jan Mortensen.

Í einum skrivi til feløgini í verkfalli, boðar Føroya Arbeiðsgevarafelag eisini frá, at Jógvan Amonsson, statsgóðkendur granskoðari hevur játtað umboða arbeiðsgevararnar.

Hann heldur, at tað kundi fingið glið aftur á samráðingarnar, um feløgini kundu valt tveir serfrøðingar at samst um, hvør veruleikin í málinum er.

## Eisini onnur mál

Tá ið talan bara er um 0,13%, hví góðtaka tit tað so ikki bara og sleppa undan verkfallinum?

– Tað kemst av, at nógv onnur mál, sum partarnir vóru samdir um frammanundan, vildu arbeiðarafeløgini als ikki hava við í semingsuppskotið.

–Talan var eitt nú øll tímalønt skuldu fáa setanarbræv, at fólk skuldu fáa ókeyps arbeiðsklæðir, umframt avtalur um tøkni og um lærlingar, eitt nú innan fiskivinnu og aling í sambandi við yrkislæru, sum verður abritt við at gera innan hesi øki.

– Vit kunnu heldur ikki liva við, at lønirnar eru ójavnar kring um landið, tí tað órógvar kappingarførið hjá virkjnuum, sigur Jan Mortensen. Lønirnar mugu vera tær somu um alt landið, leggur hann afturat. Hann vil heldur ikki seg út, um løgtingið eigur at leggja seg út í verkfallið.